Foreldur ansa nú eftir politikarum

Politikararnir í Havn vilja fegnir tosa um trupulleikan vi› barnaansingini, men foreldrini fingu eingi ítøkilig lyfti, tá Foreldrafelagi› í Havn hev›i pallbor›sfund mikukvøldi›

Eini 150 fólk vóru komin saman í Nor›urlandahúsinum mikukvøldi›, har ljós var› varpa› á ansingartrupulleikarnar. Líti› ítøkiligt kom tó burturúr

Mynd: Jens K. Vang

STEFAN Í SKORINI

Tórshavn:
– Allir politikararnir siga seg vilja økja um tali› av ansingarplássum, men tá tosi› kemur inn á ítøkiligar ætlanir, hoyra vit tær vanligu undanførslurnar.

Hesi eru or›ini hjá Sámali Johansen, sum er forma›ur í Foreldrafelagnum, sum er fyri foreldur at smábørnum í Havn.

At umstø›urnar hjá minstu borgarunum í høvu›ssta›num ikki eru í lagi kom til sjóndar mikukvøldi›, tá 150 fólk stevndu á fund í Nor›urlandahúsinum at tosa um ansingartørvin í Havn.

Foreldrafelagi› er fari› undir eitt n‡tt átak, sum hevur til endamáls at varpa ljós á, at alt ov fá ansingarpláss eru til børn í Havn. Bí›ilistarnir eru langir sum ongantí› fyrr, men framvegis liggur eingin ítøkilig ætlan frammi.

Ein partur av átakinum hevur veri› lesarabrøv, sum ver›a at síggja hvørja viku fram til b‡rá›svali›. Mikukvøldi› var› skipa› fyri pallbor›sfundi, har allir teir politisku flokkarnir vór›u umbo›a›ir.

Lappaloysnir

– Ein av undanførslunum hjá b‡rá›slimunum var, at teir kunnu ikki lova naka›, tí teir vita ikki, hvussu b‡rá›i› fer at síggja út eftir vali›. Ta› er ein vánalig undanførsla, og hvør er so meiningin vi› valfundum, um politikararnir ikki kunnu lova undan valinum, hvørjum teir fara at arbei›a fyri. Sjálvandi kunnu teir ikki lova, hvørjum málum teir fara at náa, men til ber at siga, hvørjum arbeitt ver›ur fyri, sigur Sámal Johansen.

7. september samtykti b‡rá›i› einmælt eitt uppskot vi›víkjandi barnaansing. Ta› ber í sær, at foreldur kunnu hava síni egnu børn í dagrøkt, um tey eisini taka onnur børn í dagrøkt. Tey skulu gjalda fyri síni egnu børn, og fáa pening fyri tey fremmandu børnini.

Í lesarabrævi frá Foreldrafelagnum í dag ver›ur henda loysnin kalla discount loysn. Foreldrafelagi› heldur ta› vera illgunavert, at b‡rá›i› samtykkir eitt slíkt uppskot beint undan valinum.

– Á fundinum lova›u onkrir at samgongupolitikarunum eitt ávíst tal av ansingarplássum innan eitt ávíst áramál, men ta› hava vit veri› vitni til fyrr, uttan at naka› er komi› burturúr, sigur Sámal Johansen.

Men trupulleikin hvørvur ikki sum døgg fyri sól, og ansingarpláss eru ikki á hvørjum horni. Í løtuni veksur bí›ilistin skjótari enn tali› av ansingarplássum.

Foreldrafelagi› vísir á, at tørvur er á eini heildarloysn og ikki lappaloysnum.

Eingin loysn í eygsjón

Í 1996 var› ein verkætlan gjørd, sum loysti barnaansingartrupulleikan á›renn 2006, men sí›ani er listin bara vaksin. Hetta ber bo› um, at henda ætlanin ikki hevur betra› ta ringu stø›una.

– Útlitini eru heilt einfalt ikki serliga gó› fyri eini loysn innan stutta tí›, og ta› bar fundurin eisini bo› um.

Barnaansingin hevur veri› eitt av høvu›smálunum hjá b‡rá›num at loysa seinastu árini. Politikararnir vísa á, at fólkatali› er vaksi› vi› rúkandi fer›, men ta› er ta› sama sum fyri tíggju árum sí›ani. Sámal Johansen er ikki serliga bjartskygdur.

– Eg eri ikki so bláoygdur at halda, at allir politikararnir broyta meining nú, tí teir eru meira har›hú›a›ir enn so. Tí›in er komin til at politikararnir ra›festa barnaansingina meira frammalaga enn nú, sigur Sámal Johansen.

Foreldrafelagi› fer ikki at skipa fyri fleiri pallbor›sfundum, men lesarabrøvini ver›a fleiri í tali fyri at minna politikarar á, at fleiri foreldur enn eru illa sperd.



Leivur Hansen, b‡rá›sforma›ur, vi› einum pápa, sum ikki fær sítt barn ansa›. B‡rá›sforma›urin vildi ikki lova naka›, og útlitini fyri eini loysn eru ikki gó›, sigur forma›ur Foreldrafelagsins, Sámal Johansen

Drigið verður millum seld atgongumerki og vinnarin verður funnin í høllini. Høvuðsvinningurin er ein ferð til Sveits við 12. manni til landsdyst millum Sveits-Føroyar.

MARKO´2000
SØLUSTEVNAN

Verður í ítróttarhøllini í Runavík 29. sept - 01. okt.
Opið er fríggjadag kl. 17-22 • leygardag kl. 14-22
sunnudag kl. 15-22

Luttakarar:

Skósølan Gøtugjógv
P/F Jógvan Weihe
Curri
Flísan
Sp/f Sirri
MB Tours
Sp/f Inventartænastan
Profa
Benetton
Hon & Hann
Klæmint Petersen
Tutl
Millenium
Máling og Gólv
Shop Inn
Brøður Petersen
Húðrøkt v/Jørnu
Feðgar
ABS Transport
AD-Import
Súkkluhandilin í Líðini
Esmar Simonsen
JH Møblar
Com-Data
AWI Boats
Barnaútgerð
OilWind
Sp/f Høgv
Frú S

Undirhald

Eivør Pálsdóttir
Sámal Ravnsfjall
Niels Midjord
Vísumenn úr Klaksvík
Rúna á Heygum
Ronnie Nielsen
Magni Christiansen

Magni Poulsen er frásøgumaður í samband við mótasýningarnar

SANSIR · TEL 355 355

Marko Skrivstovan, Post Boks 173, FO-620 Runavík, Føroyar
Tel 22 22 50, Tel 22 22 51 Fax +298 44 95 35, e-mail: rogvi-la@post.olivant.fo
http://www.geocities.com/marko2000fo/

Nú rópa heilsusystrarnar í Føroyum varskó:

Vit drukna í børnum sum hava trupulleikar

– Tað er harmiligt, at tað fyribyrgjandi arbeiði ímillum børn er so lágt í metum sigur Bjarta Vilhelm, leiðandi heilsusjúkrasystir

Fleiri túsund børn verða slept upp á fjall, tí tað myndugleikarnir raðfesta ikki tað fyribyrgjandi arbeiði á barna og familjuøkinum nóg høgt og nú rópa heilsusystrarnar varskó.

Myndin er tilvildarliga vald

ÁKI BERTHOLDSEN

– Vit eru um at drukna í arbeiði við børnum, sum hava ymsar trupulleikar at dragast við.

–Men tað er harmiligt at síggja, hvussu lágt landsins myndugleikar meta um tað fyribyrgjandi arbeiði ímillum børn.

Tað sigur Bjarta Vilhelm leiðari á heilsusystraskipanini.

Heilsusystrarnar í Føroyum høvdu felagsfund mikudagin, har tey viðgjørdu støðuna.

Og tað tók teimum ikki langa tíð at semjast um, at støðan er sera vánalig.

Bjarta Vilhelm sigur, støðan viðvíkjandi tí fyribyrgjandi arbeiðnum ímillum børn er nú so vánalig, at tað eru allar orsøkir til at rópa varskó.

– Landsins myndugleikar hava ferð eftir ferð víst á, hvussu stórur dentur verður lagdur á tað fyribyrgjandi arbeiðið. Men á smábarna- og familjuøkinum mugu vit ásanna, at tað verður ikki gjørt líka nógv, sum tað verður tosað.

Bjarta Vilhelm sigur, at tað verður ofta ført fram, hvussu nógv barnaverndirnar kring landið hava fingið at gera tey seinastu árini.

– Í tí sambandinum er tað eisini neyðugt at vísa á, at heilt nógv av teimum málum, sum barnaverndirnar hava til viðgerðar, eru mál, sum heilsusystrarnar vísa teimum á.

Heilsusystraskipanin umfatar øll børn í Føroyum, bæði børn í skúlaaldri og børn undir skúlaaldur.

– Heilsusystrarnar ráðgeva familjum og kanna børnini.

Í skúlanum ber tað eisini til hjá børnunum at venda sær til heilsusystrina í trúnaði við ymsum trupulleikum og tað eru ikki so fáir trupulleikar, sum koma fram tann vegin.

–Tey allarflestu børn og tey allarflestu heimini virka tíbetur heilt væl.

– Men so eru tað sjálvandi eisini nøkur fá, sum hava trupulleikar og tey, skulu vit so royna at hjálpa.

Bjarta Vilhelm sigur, at arbeiðsbyrðan er munandi økt seinastu árini.

Hon heldur,at orsøkin til tað er ikki so nógv, at talið á børnum og familjum, sum hava truulleikar, er so nógv økt.

–Orsøkin er heldur, at vit eru betri førar fyri at varnast trupulleikar.

– Men tað er eisini týðiligt, at hugburðurin er nógv broyttur, so at fólk eru skjótari at søkja sær hjálp og fúsari at taka ímóti hjálp.

Samstundis er tað tvørfakliga samstarvið á økinum nógv batnað.

Mangla pengar og fakfólk

Bjarta Vilhelm sigur, at ein stórur partur av trupulleikanum stendst av, at tað verður ov lítið av peningi sett av til hetta øki.

– Heilsusystraskipanin fær seks milliónir um árið og tað er ikki nógv, tá ið hugsað verður um, at vit umfata øll børn í Føroyum í og undir skúlaaldur, tvs, eini 15.000.

– Samstundis mangla vit fýra heilsusystrar, tvær í Havn, eina í Suðuroy og eina í Norðoyggjum.

– Hetta er stórt spell, tí heilsusystraskipanin er fremsta fyribyrgjandi tiltak yvirhøvur á barna- og familjuøkinum.

– Ein millión afturat hevði tí gjørt undurverk, tí so fingu vit sett tær fýra heilsusystrarnar, sum mangla.

Men Bjarta Vilhelm sigur, at tað er eisini ein annar stórur trupulleiki, at heilsusystrarnar hava alt ov vánaligar møguleikar at vísa børnum og familjum til serfrøðingar á ymsum økjum, tá ið trupulleikar stinga seg upp.

–Eitt nú mangla vit barnapsykologar og vit hava ongan barnapsykiatara yvirhøvur í Føroyum, samstundis, sum vit eisini mangla fysioterapeutar.

– Harumframt hava vit heldur onki tilboð til tey fáu foreldur, sum hava væntandi førleikan til at verða foreldur, so at tey kundu lært at verið foreldur.

Bjarta Vilhelm sigur, at ein avleiðing av støðuni er, at mangan verða trupulleikarnir uppdagðir nógv seinni, enn ynskiligt hevði verið.

– Mangan varnast vit ikki trupulleikarnar fyrrenn børnini eru komin í skúla, men tá eru tað ofta nógv dýrari loysnir, sum skulu til fyri at hjálpa upp á trupulleikan.

– At tað so bara eru heilt fáa staðni í landinum, at skúlalæknaskipanin virkar, ger støðuna sjálvandi ikki frægari.

Bjarta Vilhelm sigur, at heilsusystraskipanin er nú so hart fyrispent, at tað gongur ikki longir afturat..

Sleppa ikki til skúlalækna

tey koma í skúla og so aftur, tá ið tey fara úr skúlanum.

Nú hevur Jenis av Rana, løgtingsmaður, sett Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismanni í almanna og heilsumálum fyrispurning um skúlalæknan í Havn.

Hann sigur, at tað kann ikki góðtakast at børnini í havn ikki skulu sleppa til skúlalækna.

Hetta hevur fingið avvarðandi ymsastaðni frá at gera vart við seg.

Tey siga tað er verri enn so bara í Havnini, at skúlalæknaskipanin ikki virkar.

Tvørturímóti, er tað ógvuliga fáa staðni í landinum at børnini sleppa til skúlalækna.

Veruleikin er, at tað er bara undantakið, at børnini sleppa til skúlalækna og tey, sum gera vart við seg, halda, at Jenis av Rana átti ikki bara at hugsa um børnini í Havn, tí børnini á bygd eru líka nógv verd sum tey í Havn og tey hava líka góðan rætt at sleppa til skúlalækna.

Ein av teimum, sum hevur gjørt vart við seg, er Karin Strøm, heilsusystir í Suðuroyar syðru helvt.

Hon sigur, at tað er ómetaliga óheppið, at skúlalæknaskipanin ikki virkar.

Hon vísir á, at farna skúlaár hevur hon kannað 312 børn í Suðuroyar syðru helvt.

Somuleiðis hevur hon ráðgivið um heilsu, røkt og fyrbyrging.

–Av teimum 312 børnunum, havi eg víst 54 børnum víðari til serfrøðingar av ymsum slag, ella til barnaverndirnar. Børnini verða m.a. víst til kommunulækna, eygnalækna, ella til Sernámsdepilin.

–Sostatt er tað umleið sætti hvør næmingur, sum verður vístur víðari til barnavernd, ella til serfrøðing av ymsum slag.

Karin Strøm sigur, at av tí, at hon ikki er lækni, er tað ógvuliga sannlíkt, at tað eru mangir trupulleikar, sum hon ikki fær eyga á og sum tí ikki verða uppdagaðir. Eitt nú hyggir læknin eftir trupulleikum við ryggi o.ø, og hetta eru trupulleikar, sum eg í mangar mátar ikki finni, sigur hon.

Eftir, hvat skilst, er tað ein ósemja um sáttmála ímillum Landsstýrið og læknarnar, sum ger, at skúlalæknaskipanin kring alt landið mestsum er dottin niðurfyri.

Hotel Föroyar
Tlf. 317500
Hotellið við útsýninum

VIKUSKIFTISTILBOÐ

Til Matna
❖ Rækjubland
við bakaðum breyði
❖ Piparbúffur
við grønmeti
og bakaðum epli



Kostnaður kr. 150.-
Fjølbroytt
ala carte matskrá

Borðbílegging á tel. 317500 • Eisini fæst bílig gisting

Altíð vælkomin á
Hotel Föroyar
Tlf. 317500
Best Western

Sosialurin - 311820